# Gallatiltøk

**Nógv forkunnug tiltøk verða á skránni í samband við 20 ára dagin hjá Norðurlandahúsinum í døgunum 8. - 11. mai. Stýrið í húsinum hevur ynkst at hátíðarhalda dagin so fjølbroytt sum gjørligt, við tiltøkum fyri allar aldursbólkar. Sostatt fevnir hátíðarhaldið um ein almennan part, gallakonsert, ungdómskonsert og eitt familju- og barnatiltak.**



### "Hús millum miðlar"

Á stevnuni verður framsýning um Norðurlandahúsið í Dansistovuni, soleiðis sum húsið hevur verið lýst í bløðunum Dimmalætting og Sosialinum seinastu 20 árini. Eisini verða lutir, myndir og pallmyndir at síggja á framsýningini, sum Ole Wick frá Team 85 skipa fyri. Framsýningin letur upp hósdagin 8.mai kl. 15 og er ókeypis.

HÚS millum miðlar

### Koddi ella avbjóðing

Tá húsið lat upp í 1983 var nógv kjakast um leiklutin hjá Norðurlandahúsinum á mentanarliga pallinum í Føroyum. Eitt nú viðgjørdi tíðarritið Brá hendan spurning, har spurt var, um eitt slíkt hús fór at køva føroyska mentan og vera ein koddi fyri mentunnarpolitikkin. Nógv fólk fryktaðu, at húsið einans fór at rúma útlendska smala list og tónleik og at vit føroyingar fóru at standa uttanfyri vindeyga og eygleiða leikin inni í stóra glasuliga húsinum.

Í dag kunnu vit líta aftur um bak, og eftirmeta lutin hjá Norðurlandahúsinum hesi tjúgu árini. Undir heitinum: "Koddi ella avbjóðing" veður kjak um leiklut Norðurlandahúsins á føroyska mentanarliga pallinum, tey tjúgu farnu árini og tey komandi árini. Eyðun Andreassen professari og Høgni Hoydal landsstýrismaður í menta- og norðurlandamálum fara at kjakast um hetta evni og stjórin í Norðurlandahúsinum Helga Hjörvar fer síðani at geva eina frágreiðing um støðuna í dag og samstundis geva eina meting av framtíðini hjá stovninum, sum er hin stórsti av sínum slagi í Útnorðri.

Eisini avdúkar Helvinn Høst, formaður í Stýrinum fyri Norðurlandahúsið ársplakatina, sum Bárður Jákupsson hevur gjørt. Í Klingruni hósdagin 8. mai kl. 16-17.



### Galla konsert

Hóskvøldið 8. mai skipar húsið í samstarvi við Mentamálaráði fyri stórari gallakonsert fyri innbodnum. Tó soleiðis, at eini 100 atgongumerki eru at fáa til keyps.

Mangt áhugavert verður á skránni, sum byrjar við, at nýggi formaðurin í Stýrinum fyri Norðurlandahúsið, Helvinn Høst bjóðar vælkomin.

Føroya Symfoniorkestur, sum er javngamalt við Norðurlandahúsið, framførir síðani norðurlendska hátíðarskrá, undir leiðslu av Martin Mouritsen. Orkestrið fer at spæla "Finlandia" eftir Jean Sibelius úr Finnlandi, "Midsommarvaka" eftir Hugo Alfvén úr Svøríki, "Helios ouverturuna" eftir Carl Nielsen úr Danmark, "Våren" eftir Edvard Grieg úr Noregi, "Festmarsj" eftir Páll Ísolfsson úr Íslandi og "Eg oyggjar veit" úr Højgaard syrpuni, sum byggir á sangløg hjá Hans Jacob Højgaard.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í norðurlandamálum, og Per Unckel, aðalskrivari í Norðurlendska Ráðharraráðnum flyta fram røðu.

Havnarkórið, undir leiðslu av Ólavi Hátun, framførir kantatuna "Brúgvar", sum varð skrivað til Norðurlandahúsið, tá tað lat upp í 1983. Karsten Hoydal skrivaði orðini og Vagn Holmboe gjørdi lagið. Solistar verða Sanna í Brekkunum og Ernst Sondum Dalsgarð.

Umframt tjúgu ára kantatuna fer Havnarkórið at framføra eina røð av norðurlendskum sangum, eisini eftir Sunleif Rasmussen, sum í ár fekk Tónlistavirðisløn Norðurlandaráðsins. Gallakonsertin, sum byrjar kl. 19.30 endar við buffet.

### Musikkskúlin

Tórshavnar kommuna, sum læt grundstykki til Norðurlandahúsið í 1983, fer sam an við Restorff's, eisini at heiðra Norðurlandahúsinum. Hesin partur av haldinum, sum er almennur, verður fríggjadagin 9. mai og byrjar kl. 19.30 við at Jan Christiansen borgarstóri bjóðar vælkomin. Havnin fer, við Musikkskúlanum sum karmi, at heilsa Norðurlandahúsinum við balett, sangi og tónleiki. Eitt nú fara Jóna Thomsen, Jóhannes Andreasen, Andras Olsen, Anna Klett og Sigrid Rasmussen at luttaka. Tiltakið sum verður í høllini, endar við buffet og kostar 80,- krónur fyri vaksin og 20,- krónur fyri børn.



### Trio Azur

Leygardagin eigur ungdómurin. Nordens Institut á Álandi hevur latið Norðurlandahúsinum føðingardagsgávu og verður tað álendski bólkurin Trio Azur sum framførir verkið "Ciel ouvert" av Henrik Johansson, fyri floytu, klarinett og slagverk. Konsertin verður kl. 16 og kostar 80,- kr. fyri vaksin og 20,- kr. fyri børn.

### Rokk-O-Rudl

Seinni á kvøldi, kl. 19.30, verður stór Rokk-O-Rudl konsert í Høllini. Hetta verður rokktónleikur fyri ung í øllum aldri við bólkum úr Eysturoynni, Klaksvík og Havnini. Bólkarnir eru Prix vinnarin 2003 Gestir úr Gøtu, finaluluttakararnir Makrel og Hatespeech úr Havn, Minds Eye úr Klakvsík og Krit úr Havn. Talan er um eina sitikonsert. Kostnaðurin fyri konstina verður 150,- krónur.

(Mynd: Gestir)

### Nýggj barnafløga

Siðvenja hevur verið, at



Plátufelagið Tutl avdúkar barnafløgur sínar á tiltøkum í Norðurlandahúsinum. Soleiðis verður eisini nú, húsið hevur tjúgu ár á bakið. Nýggja barnafløgan eitur Sóljudansir og er eitt blómutyssi av barnasangum eftir Alexandur Kristiansen. Fløgan, sum Kristian Blak og Sharon Weiss hava lagt til rættis, verður avdúka á familjukonsert sunnudagin 11. mai kl.15. í Høllini og verða tað Spælimenn úr Borð um Borð, saman við solistum sum framføra. Solistarnir verða: Kinna Poulsen, Unn Patursson, Kári Sverrisson, Herluf Lützen og Eyðun Ásason. Eisini fer Alexandur Kristiansen at lesa upp fyri børnunum. Kostnaðurin fyri hesa konsertina verður 125,- kr. fyri vaksin og 20,- kr. fyri børn.

(Mynd av fløguhúsanum)

### Stjørnur í eitt kvøld

Sunnukvøldið 11.mai endar stóra hátíðarhaldið í sambandi við at Norðurlandahúsið verður tjúgu ár. Stóra brakið verður, tá tey trý, Guðrun Sólja Jacobsen, Jacob Andersen og Martin Petersen, úr endaumfarinum í sangkappingini "Stjerne for en aften" fara at upptraðka við ferðandi orkestri. Gestasangari á konsertini verður Brandur Enni sum fer at hita upp við trimum løgum. Konsertin verður í Høllini kl. 20,- og kostar 195,- krónur. Eykakonsert verður sama kvøld klokkan 22:00.

(Mynd: Guðrun Sólja Jacobsen)



# Tað størsta í tí minsta

**Sum brúkari og njótari hevur tónaskaldið Kristian Blak øll 20 árini verið partur av Norðurlandahúsinum, bæði á palli og sum áhoyrari ella áskoðari. Hann metir húsið sum eitt stað, har norðurlendski andin hevur kunnað ment seg og eitt stað, sum ger mun**

NORÐURLANDAHÚSIÐ 20 ÁR

*Dagfinn Olsen*

Hesin serstaki norðurlendski andin hevur kunnað ment seg í Norðurlandahúsinum og við møguleikanum fyri samstarvi. Húsið er sympatiskt og unikt, metir Kristian Blak, tá hann hyggur aftur á farnu 20 árini.

- Vit eiga góða føroyska list, men so fingu vit eitt úttrykk fyri tí, sum longu var her. Vit fingu eina beinleiðis "hotline" til hini londini kring okkum, sigur Kristian Blak.

Norðurlendski andin er yvir hesum og her er bygt tað størsta í tí minsta, sigur Kristian Blak, sum avgjørt heldur, at húsið ger mun.

- Sum tónaskald, so er húsið ofta eitt nei ella ja, hvørt tað er gjørligt at taka lut í ymsum ætlanum. Umstøðurnar eru góðar, eisini fyri aðrar listagreinir, enn tónleikin.

- Felagið Føroysk Tónaskøld var til, áðrenn Norðurlandahúsið, men eitt kamarorkestur vitjaði í 1984 og vildi hava føroyskan partiturtónleik, sum workshop. Soleiðis komu vit í gongd við at skriva føroyskan partiturtónleik, kanska hevði tað hent uttan Norðurlandahúsið, men tað er so hent paralelt, vísur Kristian Blak á, tá hann skal meta um týdningin, ið húsið hevur.

Sum fyrireikari av Fólkatónleikastevnuni hevur hann øll árini verið í tøttum samstarvi við Norðurlandahúsið.

*- Sum tónaskald, so er húsið ofta eitt nei ella ja, hvørt tað er gjørligt at taka lut í ymsum ætlanum. Umstøðurnar eru góðar, eisini fyri aðrar listagreinir, enn tónleikin, heldur Kristian Blak*



# Lat grasrøturnar ráða, tá er gróður í luftini

**Soleiðis sigur Brandur Øssursson, sum í 20 ár hevur skipað fyri Jazz, Fólka og Bluesfestivali í tøttum samstarvi við Norðurlandahúsið. - Tá lív nú er kveikt í føroyskt mentanarlív, so skal ansast eftir ikki at gerast leiðandi. Kemur initiativið frá einum stovni, so er talan um nakað stýrandi, men kemur tað frá listafólkum, so er gróður í luftini, sigur Brandur Øssursson**

NORÐURLANDAHÚSIÐ 20 ÁR

*Dagfinn Olsen*



*Norðurlandahúsið hevur verið katalysatorurin í føroyskum mentanarlívi, heldur Brandur Øssursson*

Brandur Øssursson hevur havt tætt samstarv við Norðurlandahúsið øll 20 árini. Tórshavnar Jazz, Fólka- og Bluesfestivalur hevur eisni 20 ár á baki, og Brandur hevur verið stigtakari og fyrireikari øll árini.

-Tað er ikki æltt at meta um 20 ár í lítlari viðmerking, tí tað er long søga, sigur Brandur Øssursson, tá hann verður biðin at meta um farnu 20 árini við Norðurlandahúsinum.

- Men sigast má, at Norðurlandahúsið er stóri katalysatorurin í føroyskum mentanarlívi. Og tað kom kanska, tá tørvurin var størstur. Vit høvdu fræini, ið vóru klár t blóma. Vit høvdu góðu tíðina, sjeytiárini og so kom húsið í 1983, sum hevði ráð og møguleika at menna ungdóm og føroyskt mentanarlív, sigur Brandur Øssursson.

### Má ikki gerast leiðandi

Í mong ár hevur kósin verið, at menna tað, sum er ektað. Og samstarv við feløg og einstaklingar hevur verið fyrimyndarligt. Og eisini hevur húsið fingið eyguni upp hjá politikarum. futt var ofta fyri val tosað um mentan og meint var tá við skúlar, bókasøvn og ítrótt, ikki tað skapandi, tað sum gav íblástur. Men tað gingu nærum 20 ár, áðrenn politiski myndugleikin tók mentanina í álavara, føroyski stuðulin til Norðurlandahúsið hevur verið lítil, men nú tykist, sum er ymiskt hent, metir Brandur.

Kanska var alt hent, hóast húsið ikki kom, men tað kom og hevur verið við, sigur Brandur Øssursson.

- Tá lív nú er kveikt í føroyskt mentanarlív, so skal ansast eftir ikki at gerast leiðandi. Tað mugu altíð vera grasrøturnar, sum sleppa fram, tað sum kemur niðri frá og inni á frá. Grasrøturnar vinna jí altíð fram, uttan mun til hvat hendir. Kemur initiativið frá einum stovni, so er talan um nakað stýrandi, men kemur tað frá listafólkum, so er gróður í luftini, sigur Brandur Øssursson.

3000 tónleikarar hava vitjað jazzfestivalin hesi 20 árini.

- Uttan húsið hevði einki verið og samstarvið hevur verið gott. Og festivalurin hevur ment allar listagreinir, ikki minst tónleikin her hjá okkum sjálvum, sigur Brandur Øssursson, sum so avgjørt fegnast um Norðurlandahúsið.